handVERKARIN

1. ÁRSFJÓRÐINGUR 2007 BLAÐ NR. 22 HAVNAR HANDVERKARAFELAG

Gev gætur

Niðanfyri eru nevnd nøkur viðurskifti, sum hava týdning fyri felag og limir.

EFTIRLØN

Frá 1. oktober 2006 er eftirlønargjaldið 12%, arbeiðsg./meistari rindar 10% og limur 2%.

SJÚKRAGRUNNURIN BATI

Sjúkragrunnurin Bati er bert fyri tímalønt. Mánaðarlønt fáa løn, tá tey eru sjúk. Umsóknin skal vera Bata í hendi í seinasta lagi 10. sjúkradagin.

Handverkarin rindar 15 oyru og meistarin rindar 30 oyru av hvørjum tíma í grunnin.

EFTIRÚTBÚGVINGARGRUNNUR

Handverkarar og meistarar gjalda 10 oyru av hvørjum tíma í eftirútbúgvingargrunnin VITIN. Grunnurin letur stuðul, tá handverkarar fara á skeið. Í fyrsta umfari fæst vanliga dagpeningur frá skúlanum. Hetta verður endurgoldið eftir skeiðið. Ferðaútreiðslur verða afturgoldnar sambært kvittan fyri ferðaseðil/seðlar.

LÍVSTRYGGING

Limir felagsins eru lívtryggjaðir. Ein treyt fyri at fáa útgjald er, at limagjald ikki er í eftirstøðu. Best er tí at gjalda limagjald við fastari flyting.

Umráðandi er at limir boða frá, tá broytingar eru í limastøðuni.

LØNARSEÐLAR, EFTIRLØN V.M.

Saman við lønarútgjalding skal vikuseðil fylgja við. Tað er umráðandi at handverkarin sjálvur fylgir væl við lønargjaldi og at eftirlønin er røtt (%) og at hendan verður flutt til Grunnin.

HVÍLANDI LIMIR

Hvílandi limir gjalda 200,00 kr. um árið, og so fáa teir blaðið „Handverkarin“, um teir ynskja tað.

P-TØL, ADRESSUR V.M.

Tað er umráðandi, at felagið hevur P-tøl og rætta adressu hjá limunum.

TÍMALØN

Tímalønin er kr. 113,69

Innihaldsyvirlit: **síða**

Klokkustoyping – eitt gamalt handverk	3
Felagið er í stórum vøkstri	4
Ein sólskinssøga	5
Nevndarlimir og dagligur leiðari	30

Útgevari: Havnar Handverkarafelag · Sjúrðargøta 20 · Box 203 · 110 Tórshavn
Ábyrgdarblaðstjóri: Eli Brimsvík
Blaðstjórn: Snæbjørn í Dali · **Umbróting og prent:** Pf. Einars Prent
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
Evstamark til komandi blað er 1. juni 2007 · **Blaðið er prentað: 30. mars 2007**
Avgreiðsla: Yrkadagar frá kl. 9 til 12 · Hósdag er eisini avgreiðsla frá kl. 15 til 18.
Tel. 35 48 00 · Fax: 35 48 01 · Teldupostur: handverk@handverk.fo. · www.handverk.fo

Klokkustoyping – eitt gamalt handverk

Tá vit í dag hoyra kirkjuklokku ringja seta vit tað í samband við gudstænastu ella aðra kirkjuliga handling. Men soleiðis hevur ikki altíð verið.

Tað var ikki fyrr enn í 6. árhundraði, at kirkjur í Evropa fóru at fáa sær klokku.

Lat okkum her eisini nevna, at tað var ikki einans til kirkjuligar handligar, at tær fyrstu kirkjuklokkurnar vóru brúktar.

Av tí at heidnu templini í Rom høvdu brúkt klokkur vóru mong í fyrstani ivasom, um tað var rætt at hava klokkur í kirkjunum, sum ringjast skuldi við í sambandi við kirkjuligar handlingar.

Klokka frá 1200-talinum

Í dag vita vit at Ansgar, sum vanliga verður nevndur Norðurlanda apostul (f.801-d.865), legði dent á, at kristnu kirkjurnar skuldu hava klokku, sum skuldi kima til gudstænastu, og annars eisini í øðrum samanhangi av meira verðsligum slag.

Elsta kirkjuklokkan í Norðurlondum er helst klokkan í Smollerup kirkju, nærhendis Viborg í Danmark.

Hon er mett at vera frá 1200-talinum.

… framhald á síðu 16

Eli Brimsvík formaður í Havnar Handverkarafelag:

Felagið er í stórum vøkstri

Havnar Handverkarafelag varð stovnað 12. februar 1950, og kann tí hátíðarhalda 60 ára føðingardag um trý ár.

Í nevndini eru vit samd um, at hetta er ein so mikið stórur dagur, at vit eiga at skipa fyri einhvørjum tiltaki í sambandi við 60 ára føðingardagin. Ein arbeiðsbólkur er tí settur at skipa fyri føðingardagshaldi, og í hesum sambandi er skotið upp at hava eina veitslu fyri limir við maka.

Lærlingar

Felagið hevur lagt nógva orku í at fáa lærlingunum, so góð kor sum gjørligt.

Í hesum sambandi eigur at vera nevnt, at meistararnir ikki vildu góð-

… framhald á síðu 20

Sofus Joensen, formaður í Eftirlønargrunninum:

Ein sólskinssøga

Í fíggjarheiminum verður 2006 mett at vera eitt baldrut ár, við stórum sveiggjum. Tá so er – verða peningastovnar og íleggjarar ofta meira varnir, og tað kann so ávirka eitt møguligt avkast.

Men hóast sveiggini í 2006 vóru stór, mugu vit siga at Eftirlønargrunnurin hevur staðið seg væl fíggjarliga – eisini í 2006.

Høvuðstølini í roknskapinum hjá Eftirlønargrunninum eru s. 13



Justeringar

Eitt, sum eisini eigur at vera nevnt her er, at í 2006 varð farið undir at justera íløgurnar hjá Eftirlønargrunninum. Endamálið við hesum var, at lyfta okkum longur upp í avkasti. Sagt við øðr-

um orðum, – fáa meira fyri ognirnar hjá Eftirlønargrunninum. Og vit duga longu nú at síggja, at hetta var ein rætt avgerð, sum vit tóku.

Frammanundan hevði Eftirlønargrunnurin koyrt eftir sama íløguleisti, øll árini síðani hann var stovnsettur. Og sum øllum kunnugt, so broytist peningaheimurin alla tíðina, og tí er eisini neyðugt at gera justeringar, tá man sær, at tað verður til fyrimuns fyri Eftirlønargrunnin.

Íløgurnar

Tá ið vit gera íløgur, og tá serliga fyri eftirlønargrunnin, kunnu vit ikki altíð gera tær íløgur, sum vildu kasta mest av sær, ella sum eru mest lovandi í løtuni. Hetta kemst av, at vit eru heft at lógum og reglum, ið tryggja, at grunnurin ikki missur pening.

Vit mugu minnast til, at peningurin, ið grunnurin umsitur, er ikki peningur hjá grunninum, men peningur hjá hvørjum einstøkum limi.

Tryggingareftirlitið

Vit hava eisini ta trygd, at Tryggingareftirlitið fleiri ferðir um árið staðfestur, at grunnurin til eina og hvørja tíð er solventur, og at ásettar treytir verða hildnar.

Harumframt eiga vit her at nevna at vit altíð ráðføra okkum við grannskoðaran, áðrenn vit gera størri broytingar á íløguøkinum.

Eftirlønin

Á privata arbeiðsmarknaðinum komu vit í 2006 upp á 12% í inngjaldi, og á almenna økinum eru vit komin upp á 11%.

So ikki kann sigast annað enn, at vit eru væl við, tá tað snýr seg um eftirløn. Tá vit so eisini hugsa um, at vit byrjaðu ikki fyrrenn í 2000, so er ongin ivi um, at vit eiga at vera stolt av okkum sjálvum, at vit veruliga eru komin so langt, sum vit eru.

Politikkarar

Vit mugu minnast til, at hjá okkum er tað ikki so lætt, sum hjá politikarunum. Teir kunna við einum pennastroki fáa sær sjálvum eina framúr góða eftirløn.

Og ikki nokk við tað. Teir eru farnir so langt aftur í tíðina, at teir helst allir – allar helst – sita við hægstu eftirløn, tá teir fara úr tinginum.

Eftirløn eftir ongari tíð

Politikararnir hava megnað at vunnið sær sjálvum fulla eftirløn eftir so at siga ongari tíð.

Tað eg veit um er, at tað tekur einum landsstýrismanni ella einum tingmanni einans 8 ár at fáa fullan eftirlønaraldur, og tað er óhoyrt.

Tað svarar til, at teir fáa 60% av eini tænastumanna løn, hvat hon so enn er til tað tíð. Og neyvan kann hon líknast við okkara lønir.

Um vit samanbera til dømis við okkum, so tekur tað okkum omanfyri 30, ella fyri at vera heilt korrektur, 37 ár at koma upp á fulla eftirløn, so har er munurin til at taka og føla uppá.

Nú er tað alt meira sjónligt, at tað, sum vit høvdu vænta, og hava sagt til næstan allar aðalfundirnar, líka síðan vit stovnaðu okkara egna eftirlønargrunn, at politikarar úr øllum flokkum byrja at skeita eftir okkara eftirlønargrunni, og eftir Samhaldsfasta.

Samhaldsfasti

Vit hoyra nú javnan at politikarar, koma við ymiskum uppskotum, sum øll ganga út uppá, at arbeiðsmarknaðurin – tað vil siga vit og arbeiðsgevarin – skulu sjálvir taka okkum av okkara gomlu.

Tað er fyri so vítt ikki nakað galið við tí. Tað einasta, ið fellur mær fyri bróstið er, at øll skulu gjalda inn til Samhaldsfasta, alt eftir, hvat man forvinnur.

Og líka mikið um hann ella hon hevur eina aðra eftirløn ella ikki.

Ketan fer av

Men so kemur tað til tað, at ketan hjá mær líka sum fer av, og eg klári ikki at fylgja við teimum.

Teir meina, og tað við fullum álvara, at tey, sum hava eina ella aðra eftirløn ella inntøku, líka mikið hvat, skulu snøgt sagt ikki hava útgjald úr Samhaldsfasta eftirlønargrunninum. Tað vil við øðrum orðum siga, at tey, sum hava víst samfelagssinni, og tikið ein part av lønini og avsett hana til eftirløn, verða nú revsaði.

Tí vit skulu minnast til, at tað eru vit sjálvi, sum gjalda alla okkara eftirlønin. Eftirlønin er ein partur av tí, sum vit hava samráðst okkum til.

At arbeiðsgevarin flytur eftirlønina fyri okkum, tað er einans av praktiskum orsøkum.

Avseting

Her fari eg eisini at nevna, at vit í 2006 – fyri fyrstu ferð – hava sett tann pening av, sum Havnar Handverkarafelag, í sínari tíð, setti í grunnin til startkapital.

Hetta varð gjørt fyri at kunna latað limum, sum lúka tær treytir, sum standa í viðtøkunum, eyka ansinitet, upp til 10 ár.

Sum limirnar helst allir vita, so setti felagið, sambært eini aðalfundarsamtykt, 5 mill. kr. í eftirlønargrunnin sum eginpening. Hetta var ikki annað

… framhald á síðu 9

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

- ✓ *Handverksútbúgvingar*
- ✓ *Støðisútbúgving*
- ✓ *Yrkisakademiútbúgvingar*
- ✓ *Skúlaheim*

Marknagilsvegur 75 • Postboks 3239 • 110 Tórshavn • telefon 308050 • telafax 308051

www.tst.fo • tst@tst.fo

… framhald frá síðu 7

enn eitt krav frá tryggingareftirlitinum, sum er vanligt, tá talan er um eginpening í eftirlønargrunni. Tað, ið hesin peningur, sambært viðtøkum, skuldi brúkast til var, at keypa teimum limum í Havnar Handverkarafelag, ið lúka ávísar treytir, upptil 10 ára eftirlønaraldur.

Útgjald

Nú eru vit komin so mikið langt, at Grunnurin reiðiliga er farin at gjalda út til teir limir, ið nú eru komnir í pensjónsaldur. Og vit hava fyri fyrstu ferð – saman við okkara aktuari – sett eina upphædd á, hvat hetta kemur at kosta grunninum.

Hetta vísir, at tað kemur at kosta omanfyri 7,7 mill. kr. Allan hendan pening hava vit avsett í roknskapinum fyri 2006.

Av hesi orsøk vísir roknskapurin fyri 2006 eitt hall uppá 5 mill. kr. Men grunnurin er so mikið sterkur, at vit uttan trupulleikar klára hesa stóru upphædd. Ein orsøk, sum vit her eiga at nevna er, at vit hava havt góð ár við avkasti og lágar rakstrarútreiðslur.

Og samanumtikið, kunnu vit siga, at tað sum alt snýr seg um er, at hava so lágar umsitingarútreiðslur sum gjørligt, og so høgar og forsvarligar íløguinntøkur sum gjørlllgt.

… framhald frá síðu 12

Nevndarlimirnir Koos Kamminga og Bjarni Pétursson.

Ein góð byrjan
Er grundarlagið í lagi? Timburhandilin og 2x3 ynskja at bjóða tær eina góða byrjan við einum breiðum og góðum úrvali av Mascot arbeiðsklæðum og DeWALT amboðum.
TIMBUR HT HANDILIN

Nýtið bara bestu útgerð umborð á føroyskum fiskiførum
VARTA
THE BATTERY EXPERTS
Battariir Til Øll Endamál
Fartelifonir
Hoyri Apparatir
Ur og mangt annað
Eisini hava vit øll vanlig battariir
Heil- og smásøla, landsins bestu battariir, og landsins bestu prísir
PÓLAR
Akkumulatorhandilin v/Margeir Ørvarodd
Sigmundargøta 26 - 100 Tórshavn
tel. 31 83 47 - fax 31 83 67 fartel. 21 28 60

Netbóking

keyp tína ferð tá tað passar tær...

www.sansir.fo

Tað er lætt at keypa ferðaseðlar frá Atlantic Airways.
Far inn á atlantic.fo og bílegg tín ferðaseðil.
Tað einasta, tær nýtist, er eitt gjaldkort.

Gjaldkort, sum kunnu nýtast: Dankort/VISA, VISA, MasterCard, Diners Club.

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways ger tað stuttligari at liva í Føroyum

www.atlantic.fo

… framhald frá síðu 9

Ábyrgd

Eg fari her at heita á limirnar um at ansa eftir, at sáttmálin verður hildin. Tað vil siga, at arbeiðsgevarin flytur tað hann eigur at flyta. Her hugsi eg serliga um, at tit eiga at kanna, at øll eftirlønin verður flutt til grunnin.

Sjálvandi kanna okkara skrivstovufólk eftir, at arbeiðsgevararnir gjalda tað teir eiga at gjalda, men tað er eisini umráðandi at limirnar eisini sjálvir fylgja við, og skjótast gjørligt gera vart við, um okkurt er, sum ikki er rætt.

Tað ræður um at fanga slíkt skjótast gjørligt. Óneyðugt er helst at endurtaka, at her er talan um pening, sum hvør einstakur limur eigur, og tí liggur eisini ein ábyrgd har.

Her eiga vit eisini at nevna, at í onkrum føri verður peningur fluttur til grunnin uttan, at upplýst verður hvønn gjaldið er fyri. Tá verður sjálvandi roynt at finna eigaran, men tað sigur seg sjálvt, at tað ikki altíð er lætt, og tá kann onkur verða við sviðið so.

Trygd

Viðvíkjandi trygd eiga vit at nevna at grunnurin hevur fingið at vita frá Tryggingareftirlitinum og frá Dátueftirlitinum, at allar okkara skipanir eru góðkendar uttan nakrar viðmerkingar.

Grannskoðarin hevur eisini givið okkum tað bláa stemplið, so her er ongin ivi um, at alt er trygt og í góðum hondum.

Roknskapur

Víst verður annars til høvuðstølini í roknskapinum hjá Eftirlønargrunninum á síðu 13.

Samandráttur av roknskapi fyri 2005og 2006:

Eftirlønargrunnurin:

Rakstur	2006	2005
	kr.	kr.
Eftirlønargjøld	15.474.131	9.550.028
Umsitingargjøld	814.464	502.633
Fíggjarinntøkur	1.572.158	980.241
Inntøkur tils.	**17.860.753**	**11.032.241**
Eftirlønarútgjaldingar	-451.731	-284.355
Broyting í eftirlønaravsetingum	-22.068.015	-8.706.393
Lønir	-264.560	-91.868
Fyrisitingarútreiðslur	-467.864	-414.248
Rentuútreiðslur	-1.219	-6.370
Úrslit áðrenn skatt	-5.392.636	1.529.668
Skattur av ársúrsliti	0	0
Rakstrarúrslit	**-5.392.636**	**1.529.668**
OGN:		
Lánsbrøv	29.799.989	39.603.082
Onnur áogn	0	5.000
Tøkur peningur	30.570.804	3.933.385
Ogn í umferð til samans	30.570.804	3.933.385
OGN TIL SAMANS	**60.370.793**	**43.541.467**
SKYLDUR:		
Eginpeningur	1.144.794	6.537.430
Ábyrgdarlán	5.000.000	5.000.000
Ábyrgdarpeningur til samans	6.144.794	11.537.430
Eftirlønaravsetingar	52.227.268	30.159.253
Skuld	1.998.31	1.844.784
SKYLDUR TIL SAMANS	**60.370.793**	**43.541.467**

HÚSASMÍÐ

Finnur Simonsen

tel. 31 45 49 - 51 45 49 - fax 31 83 81

Málarameistararnir

FALKENBERG

Tlf. 21 31 51 Tommy

Tlf. 21 31 54 Benny

SKIPASMIÐJAN

www.faroeyard.fo

Lat heldur okkum gera tað...

Húsavarðartænastan er altíð klár. Vit gera tímasáttmálar ella heildarloysnir til virkir og stovnar, har vit altíð eru til reiðar at gera umvælingar ella aðrar uppgávur – alt samdøgrið.

...húsavarðaarbeiði
...alt snikkara- og timburarbeiði
...umvælingar
...sethúsabygging

Tel 565589 - 565590
hvt@kallnet.fo, Fax 315590

Húsavarðartænastan

Ognað tær tín egna húsavørð

Vit veita ráðgeving í tryggum og hugnaligum umhvørvi

SUÐUROYAR SPARIKASSI
www.sparsu.fo, Tel 35 98 70

P/f Einars Prent · Tel +298 31 49 29

FØROYA BETONGSAGING Sp/f
www.betongsaging.fo

Føroya Betongsaging Sp/f · FO-620 Runavík · Faroe Islands
Tel: +298 44 75 43 · Mob: +298 21 75 43 · Fax: +298 44 88 98
E-mail: betongsaging@betongsaging.fo

… framhald frá síðu 3

Miðøldin

Í miðøldini høvdu klokkurnar í Evropa týðandi leiklut. Tað vóru t.d. serligar klokkur, ið høvdu týdning fyri landbúnaðin. Hesar klokkur ringdu, tá tað skuldi sáast, og aftur tá avgrøðin skuldi heystast, og sanniliga eisini, tá marknaður skuldi haldast.

Í 13. øld vóru kirkjuklokkurnar í Fraklandi brúktar til at býta dagin upp í morgun, middag og kvøld.

Og í øllum Evropa ringdu klokkurnar um 8-9 tíðina á kvøldi fyri at boða frá, at nú var tíð at sløkkja eldar og steingja hurðar.

Gjøgnum øldirnar hava kirkjuklokkur verið boðberar um týdningarmiklar hendingar – alt frá eldsbruna, gudstænastu, barnadópi og brúdleypi.

Stormklokkan og eldsbruni

Stormklokkan ljóðaði, tá eldsbruni ella fíggindin var í nánd.

Tíggunds-klokkan minti kirkjufólkið á, at nú var tíð at gjalda prestinum tað hann átti til góðar; og ein onnur klokka boðaði frá, at nú fóru býarportrini at verða latin aftur.

Og so løgið tað ljóðar kundu klokkur verða revsaðar. Tað hendi t.d., tá keisarin Karl Fimti stevndi klokkuni „Roeland“ í Belgiska býnum Gent.

Hann metti, at klokkan hevði øst fólk upp í sambandi við flamska uppreisturin, sum var í 1540. Hann dømdi tí klokkuna til niðurtøku.

Átrúnaðarligar kenslur

Ongin ivast í, at kirkjuklokkur megna at vekja sterkar átrúnaðarligar kenslur.

Av hesi orsøk vóru í Fraklandi boð givin um at smíða allar kirkjuklokkur um til kanónir, tá allir halgidagar vóru avsagdir undir fronsku kollveltingini í 1789. Bert nakrar fáar av teimum størstu klokkunum í Fraklandi vóru hangandi og sluppu snikkaleysar. Ein teirra var klokkan „Emmanuel" í Notre Dame kirkjuni; hon skuldi røkja uppgávuna sum stormklokka.

Tað var í veruleikanum hendan oyðileggingin av kirkjuklokkum, sum gjørdist byrjanin til kenda Paccard klokkustoyparíið í Annecy-le-Vieux, sum enn er millum tey fremstu í Fraklandi og Evropa.



Klokkustoyparin J. P. Pitton

Tann lítla bygdakirkjan í Quintal, 12 kilometrar frá Annecy í Fraklandi, var ein av teimum mongu, sum noyddist at lata kirkjuklokkuna frá sær undir fronsku kollveltingini. Men tá kollveltingarumboðini fóru úr bygdini í 1796, metti sóknarpresturin, at tað kanska var vandaleyst at fáa eina nýggja klokku til vega. Hann sendi tí boð til ein klokkustoypara í Sveis, nevndur J. P. Pitton.

Ferðandi handverkarar

Í teirri tíðini vóru klokkustoyparar ferðandi handverkarar, sum stoyptu klokkurnar á staðnum. Og tá Pitton kom til Quintal, bað hann borgarstjóran í býnum, Antoine Paccard, fáa sær ein mann at ganga sær til handa.

Men alt bygdafólki var upptikið av heystingini, og Antoine Paccard mátti tí sjálvur traðka til sum hjálparmaður.

Saman stoyptu teir báðir eina klokku, sum vigaði meira enn 800 kilo, – við vøkrum ornamentum m.a. einum kristushøvdi.

… framhald á síðu 24

Jógvan Weihe

Vit seta krøv
til dygdina
trygdarhjálmar
trygdarskógvar
og tey røttu klæðini

p/f Jógvan Weihe - Stiðjagøta 10 - tel. 35 38 97 - www.jogvan-weihe.fo



TÁ ALT SKAL PASSA SAMAN

HEILDARVEITING INNAN EL-INNLEGGING, RÁÐGEVING OG PROJEKTERING

- El-innleggingar
- Ljós og talvur
- EDV- & telefonnet
- Neyðstreymur til X-felt og teldur (No-break og diesel)
- Køling av X-feltum og teldurúmum (air condition og køliskipanir)
- Trygging av X-feltum og teldurúmum (atgongueftirlit, innbrotsávaring, eldávaring og eldsløkking)

SISKO 291600

LM ELECTRIC

Hoyvíksvegur 53 • 100 Tórshavn • Tel 35 12 20 • Fax 35 12 30 • lm@lm.fo • www.lm.fo

SAMDØGURTÆNASTAN SVARAR ALTÍÐ Á TEL 35 12 20

AGA Føroyar - Føroya Gassøla

- **Ídnaðargass:** Skeri- og sveisiamboð
- **Húsarhaldsgass:** Gassapparat, komfýrar, hitaovnar, gassgrýtur
- **Campinggass:** Kókibluss, hitaovnar
- **Gassbrennarar:** Til sveising av takpappi, lodding, svíðing
- **ESAB:** Elektrodir og sveisiútgerð

- vit hava sølustøð kring landið

Akranesgøta 2 · Postrúm 1088 · FO-110 Tórshavn
tel 315544 · fax 311706
e-mail: gassola@post.olivant.fo

… framhald frá síðu 4

taka, at lærlingar eisini skuldu vera umfataðir av eftirlønargjaldinum, sum er partur av núgaldandi sáttmála. Vit vóru púra greið í hesum máli, og fingu meistararnar at góðtaka okkara sjónarmið uttan at tað gjørdist neyðugt við gerðarrætti, sum vit annars ikki høvdu ivast í at brúkt í hesum føri.

Vit eru væl nøgd við at lærlingar nú eru umfataðir av eftirlønargrunninum.

Arbeiðsgevaragjaldið fyri teir er í løtuni 4,5%. Eisini arbeiða vit við at fáa lærlingar at verða umfataðir av tryggingini, tó við einum lægri gjaldi. Men tá tað eisini eru onnur viðurskifti, sum vit ynskja broytt venda vit aftur til tað seinni.

Burturarbeiði

Í §19 í sáttmálanum stendur hetta um burturarbeiði: „Fyri burturarbeiði verður vistarhald og ferðaútreiðslur goldnar. Ferðingartíðin verður goldin við vanligari løn fyri vanliga arbeiðstíð."

Henda partin av sáttmálanum ynskja meistararnir broyttan, men vit hava gjørt greitt, at so leingi einki annað er fyriskrivað, so er tað sum stendur í sáttmálanum galdandi. Men her eigur at vera nevnt, at vit eru sinnað at samráðast um spurningin við meistararnar um teir ynskja broyting á hesum øki. Men sjálvandi fara vit ikki at lata nakað fyri einki. Tað fara vit at gera greitt, tá vit fara undir samráðingar í heyst.

Yrkisdepilin

Vit hava fingið umboð í yrkisnevndir, so sum skoðanarmeistarar og nevndir til millum annað góðkenning av læruplássum. Eisini eru vit við í kunningarátaki til fólkaskúlan (9 flokk) um útbúgvingarmøguleikar.

Somuleiðis er ætlanin at gera átak til at velja ársins lærling og læruplass.

Tekniski Skúli

Í stýrinum fyri Tekniska skúla hava vit sum kunnugt eisini stýrislim. Stýrisarbeiði hevur fyri tað mesta verið fundir um nýggja Skúladepilin í Marknagili, sum arbeitt hevur verið við.

Komið er nú so mikið langt, at um ikki so langa tíð, verður farið undir prosjektering. Og tá tað er komið uppá pláss, verður farið til verka, so tað er at frøast um.

Skipasmíð aftur á Skála

Á várið 2006 fingu vit fyrispurning frá P/F Tórshavnar Skipasmiðju, um ikki tað kundi lata seg gera at fáa fólk úr Pólandi til Føroya at smíða ein stálskrokk til P/F Thor í Hósvík. Hetta komst av, at

allar skipasmiðir bæði í Pólandi og aðrastaðni vórðu fult upptiknar. Bíðitíðin var í minsta lagi 2 ár.

Pólska skipasmiðjan hevði ovmikið av arbeiðsmegi, og tí bleiv spurt um skipasmiðjan í Pólandi kundi fáa loyvi at senda sveisarar til Føroya at smíða skrokkin. Føroyskir handverkarar skulu gera alt annað arbeiði í hesum sambandi.

Eftir nakrar innanhýsis fundir, og samráðingar samdust vit um at royna hesa loysn, og var loyvi givið til 4 ár fyrst. Vísir tað seg at ganga væl er møguleiki fyri at leingja hesa avtalu.

Frálandavinnan í Noregi

Fyrst í juni 2006 vóru umboð fyri Havnar Handverkarafelag og Skála Handverkarafelag saman við umboðum frá Pam Offshore í Oslo eftir innbjóðing frá El & It forbundet fyri at fundast um teir handverkarar, sum starvast innan Offshore í Noreg.

Úrslitið var ein avtala ímillum partarnar. Í staðin fyri tað sum var. Eisini varð avtalað, at allir handverkarar í starvi í Noreg fyri Pam Offshore skula verða limir í Havnar Handverkarafelag. Teir sum starvast har fyri El-Service skula verða limir hjá Skála Handverkarafelag, og ger El & It ikki avtalur við onnur fakfeløg.

Samanumtikið er hetta ein rímiliga góð avtala, men sum so mangan alt kann gerast betur, – tað er tað vit alla tíðina mugu leggja dent á.

Lívstryggingin

Sum limir helst vita, so var lívstryggingaravtala gjørd við Alka forsikring, sum kom í gildi í juni 2005. Ikki kann sigast annað enn, at vit eru sera væl nøgd við hesa avtalu, sum nú hevur koyrt í hálvt annað ár. Tíðin er eisini komin har til, at vit eru farnir at endurskoða tryggingina og hava nøkur modell á borðinum. Í hesum sambandi var Hans Jørgen Jensen frá Alka við til aðalfundin, har hann greiddi frá ymiskum tryggingarviðurskiftum.

Ognin í Stoffalág

Virksemi í felagnum er støðugt vaksandi, og hava vit tí tosað um at flyta niðanaftur í hús felagsins í Stoffalág. Har eru umstøðurnar munandi betur. Í staðin kundu vit leiga ognina í Sjúrðargøtu út.

Onkur fyrispurningur hevur verið. Í Stoffalág er eisini betur pláss til annan aktivitet, til dømis at vísa útlendskan fótbólt á stórskíggja.

Landsfelagið er eisini í vøkstri, og nýggjasta felagið, ið er á veg inn í LFH er Føroya Prentarafelag við u.l. 50 akt-

… framhald á síðu 26

Ídnaðar- og garaguhurðar

Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður

Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn

Henning Sørensen

MÁLARAMEISTARI

TEL. 31 47 87 & 21 89 31

VINDEYGUNI SIGA ALT

HDYGD umfatar ymsar vørur:

- vindeygu
- altanhurðar
- úthurðar

Úr ymsum tilfari:

- træ
- træ/alu
- plast

Við ymsum funktiónum:

- toppsving
- síðusving
- síðuhongd
- topphongd

Við 10 ára trygd:

- døgg millum rútarnar
- rotskaðum (treytað av at vit mála liðugt)
- at viðurin skjýtur seg og fer sundur í lamineringini
- funktiónsfeilum á besløgum

REPROZ

HDYGD

Í Geilini 2 | FO-385 Vatnsoyrar | Tel.: +298 332177 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

rør-tænastan

Vatn·Hiti·Sanitet·Ventilatión

Eyðfinn Hansen
í Geilini 5
FO-175 Kirkjubøur
Faroe Islands
tel./fax: +298 32 81 80
fartel.: +298 22 81 80
e-mail: eydfinnh@post.olivant.fo

elmek

v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo

Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl

BAXI KETIL

BALTIC CS
18-25Kw

Sera orkusparandi ketil frá BAXI.

CE góðkendir.
DS/ISO 9001 góðkendir.

Við kappa til oljufýr

Ein tann mest orku-sparandi ketil á føroyska marknaðinum.

Síggj kanningina á www.sparolie.dk

Tórshavn:
Stiðjagøta 2 - Postboks 378
tel 30 93 10 - fax 30 93 11

Vágur:
Á Marknoyri
tel 37 35 35 - fax 37 35 65

demich

… framhald frá síðu 16

Paccard gjørdist klokkustoypari

Í samstarvinum við Pitton lærdi Paccard so mikið nógv, at hann fekk dirvi til at bjóða seg fram sum klokkustoypari. Hetta eydnaðist honum so mikið væl, at hann gjørdist klokkustoypari burturav.

Og síðani hava eftirkomarar hansara – í seks ættarlið – stoypt meira enn 70.000 klokkur, ið eru at finna um allan heimin, og sum allar hava innskriftina: „Paccard Me Fecit“, ið er latín og merkir „Paccard gjørdi meg“.

Annar Heimsbardagið

Tá týskarar hertóku Paris undir seinna heimsbardaga, 14. juni 1940, gjørdu teir skjótt greitt, at ringjast skuldi – undir ongum umstøðum – við kirkjuklokkunum í franska høvuðsstaðnum.

Hetta forboð varð eisini hildið. Tí undraði tað mangan, tá ið klokkurnar í Notri Dame kirkjuni brádliga fóru at ljóma seint á kvøldið tann 24. august í 1944.

Smollerup kirkja nærhendis Viborg í Danmark.

Elsta kirkjuklokkan í Norðurlondum er helst klokkan í Smollerup kirkju, nærhendis Viborg í Danmark. Hon er mett at vera frá 1200-talinum.

Og uppaftur meiri bilsin gjørdust fólk løtu seinni, tá klokkan í Saint-Merri-kirkjuni eisini fór at ringja við sínum máttmiklu gomlu „tónum“. Hon er elsta kirkjuklokka í Paris, frá 1331. Síðani fór tjúgu tons tunga klokkan í Sacré-Coeur, „Savoyarde“, størsta klokka í Fraklandi, at ljóma, og hareftir ein fyri og onnur eftir.

Og skjótt – nærum skalv – allur býurin av teimum fleiri hundrað ringjandi kirkjuklokkunum.

Tey, sum vóru stødd í Paris hetta kvøldið, siga seg ongantíð gloymda hesa hending.

Tað sum klokkurnar boðaðu frá var, at teir fyrstu fronsku hermenninir vóru komnir fram til útjaðaran av býnum, og at frælsið var í nánd.

TEAM65
Nýtt Kall 200
Nú eisini við 200 ókeypis sms-boðum um mánaðin
Frá 1. desember hava vit gjørt fartelefonhald okkara, Kall 200, enn betri og biligari. Umframt teir 200 ókeypis minuttirnar hvønn mánaða at nýta innanlanda, bjóða vit tær nú eisini 200 ókeypis sms-boð um mánaðin. Virði á teimum 200 sms-boðunum er 160 krónur, um tú rindar vanligan sms-takst*. Mánaðargjaldið fyri Kall 200 er 134,40 krónur. Minuttprísurin aftaná teir fyrstu 200 minuttirnar er einans 96 oyru** fyri samrøður í Føroyum. Um tú vilt hoyra meira um nýggja Kall 200 fartelefonhaldið við teimum 200 ókeypis minuttunum og teimum 200 ókeypis sms-boðum at nýta hvønn mánað, kanst tú ringja 20 20 20 og spyrja eftir einum av virkisrøktarum okkara.
Legg til merkis, at um tú hevur Kall 200 fartelefonhald frá okkum, koma tey 200 ókeypis sms-boðini av sær sjálvum á hald títt.
* Virkiskundar okkara fáa tó vanliga antin 10 ella 20% í avsláttri av listaprísinum, alt eftir, hvussu stór samlaða mánaðarnýtslan hjá virkinum er.
** Prísurin er við 10% avsláttri. Um tú hinvegin fær 20% avsláttur er minutt-taksturin aftaná fyrstu 200 minuttirnar einans 73 oyru.
Allir prísirnir eru uttan meirvirðisgjald
Kall • Óðinshædd 2 • 100 Tórshavn • Tel 20 20 20
www.kall.fo
kall
20 20 20

Dánjal Pauli Djurhuus, Sofus Joensen og Eli Brimsvík.

… framhald frá síðu 21

ivum limum, og kanska líka nógvum leysgangandi, so tað gongur stútt framá.

Lønarsamráðingar

Tann fyrsta oktobur fer núverandi sáttmáli úr gildi, og vit fara at leggja alla orku í at fáa ein so góðan sáttmála sum gjørligt.

Tað hevði eisini verið gott, at fingið onkur ynski frá limunum, eg hugsi her um hvat vit skulu leggja størstan dent á í lønarsamráðingunum. Skulu vit t.d. gera ein longri sáttmála hesaferð, og á tann hátt fáa meiri burturúr?

Dansk Folkeferie

Í fjør fingu vit í lag samstarv við Dansk Folkeferie, og er tað at vóna at limirnir fáa gagn av hesum. Upplýsingar um hetta fáast altíð á skrivstovuni.

Handverkarin

Felagsblaðið „Handverkarin" er komin regluliga út síðani 2001. Hetta er blað nr. 22. Enn sum áður, heita vit á limirnar um at lata tilfar til blaðið, og gevi tykkum til kennar um tit hava ynski um mál, sum tit ynskja nærri lýst í Handverkaranum. Og sigi tykkara meining um aktuel mál, sum røra seg í samfelagnum.

EDV trygd

Fyri einum góðum ári síðani gjørdu vit samstarvsavtalu við Elektron um eftirlit, røkt og trygd av felagsins EDV skipan. Tað vil siga, at alt edv-samskiftið hjá felagnum koyrir í gjøgnum Elektron. Tey hava dagligt tekniskt eftirlit við skipanini, og hava altíð trygdaravrit liggjandi um okkurt skuldi verið áfatt. So á tí økinum er tryggleikin í hásæti.

… framhald á síðu 31

Høvuðstølini í roknskapinum 2005 og 2006:

Havnar Handverkarafelag:

Rakstur	**2006**	**2005**
	kr.	kr.
Inntøkur tilsamans	3.926.459	2.689.423
Rakstrarútreiðslur	-3.808.086	-2.785.304
Úrslit áðrenn avskrivingar v.m.	118:373	-95.881
Avskrivingar	-183.526	-162.154
Úrslit áðrenn rentur	-65.153	-258.035
Rentur, netto	-390.244	479.472
Rakstrarúrslit	**-325.091**	**221.437**
OGN:		
Støðisogn		
Materiell støðisogn	4.506.018	4.512.702
Fíggjarlig støðisogn	5.699.000	5.699.000
Støðisogn til samans	10.205.018	10.211.702
Ogn í umferð		
Áogn	1.189.591	920.937
Virðisbrøv	9.122.007	10.911.533
Tøkur peningur/	3.771.517	1.882.668
Ogn í umferð til samans	14.083.115	13.715.139
OGN TIL SAMANS	**24.288.133**	**23.926.840**
SKYLDUR:		
Eginpeningur	23.511.471	23.186.380
Ognarar	670.539	532.376
Onnur skuld	106.123	208.084
SKYLDUR TIL SAMANS	**24.288.133**	**23.926.840**

Hvat gert tú við tínar pengar

Kundi tú hugsað tær at vita, hvørjar møguleikar tú hevur? Kom inn til okkara og fá eitt prát. Í felag finna vit útav, hvørjar íløgur hóska tær best. Tað er einfaldari, enn tú trýrt.

Tel 35 15 00 · Fax 35 15 01 · www.kaupthing.fo

KAUPTHING

ALT INNAN VENTILATIÓN, HITA OG SANITET

TLF: 31 20 00

Maria Poulsen p/f

www.mariapoulsen.fo

El-amboð
til handverkaran?

Balslev
sjálvandi!

Paslode
makita
metabo
ELEKTRA BECKUM

Tel 31 11 22

www.balslev.fo

Nevndarlimir og dagligur leiðari

Kristian Eli Brimsvík

Bústaður: á Fløtti 14 A · Tórshavn · tlf. 31 64 32 og 23 48 02
Formaður í Havnar Handverkarafelag og nevdarlimur í Eftirlønargrunninum
Føddur: 27. januar 1958 · Útbúgvin skipssnikkari 1978
Arbeiðir á timburdeildini á Tórshavnar Skipasmiðju

Danial Pauli Djurhuus

Bústaður: Vestmanna · tlf. 21 46 69 · tlf. 23 48 09
Næstformaður í Havnar Handverkarafelag og formaður í Landsfelag Handverkaranna
Føddur: 14. juni 1959 · Útbúgvin bygningssnikkari
Arbeiðir sum húsavørður hjá Dimmalætting

Koos Kamminga

Bústaður: Heygsvegur 29 · Tórshavn · tlf. 31 01 54 og 26 05 36
Kassameistari í Havnar Handverkarafelag
Føddur: 15. august 1946 · Útbúgvin maskinistur 1963
Arbeiðir á Vatnverkinum hjá Tórshavnar kommunu

Bjarni Pétursson

Bústaður: Heygsbreyt 18 · tlf. 21 23 58
Nevndarlimur í Havnar Handverkarafelag og nevndarlimur í Eftirlønargrunninum
Føddur: 3. mars 1942
Útbúgvin bilmekanikari 1965

Sofus Joensen

Bústaður: Ovaragøta 70 · tlf. 31 68 49
Nevndarlimur í Havnar Handverkarafelag og formaður í Eftirlønargrunninum
Føddur: 31. juli 1956 · Útbúgvin elektrikari
Arbeiðir sum húsavørður á Lágargarði

Petur Juul Jacobsen

Bústaður: Varðalág 5 · Tórshavn · tlf. 23 48 03
Dagligur leiðari í Havnar Handverkarafelag
Føddur: 26. september 1962 · Útbúgvin grannskoðari (merkonumur í grannskoðan) í 1996 og skrásettur grannskoðari í 2005

… framhald frá síðu 26

Hetta hevur stóran týdning, nú mest sum alt arbeiði á skrivstovuni er EDV-arbeiði. Samstarvið við Elektron hevur nú koyrt í eitt ár, og vit kunnu ikki siga annað enn, at vit eru væl nøgd við samstarvi við Elektron.

Atlants Kolvetni

Vit eiga framvegis partabrøv í Atlants Kolvetni, og eru spentir uppá um olja verður funnin, so at kursurin hækkar enn meir. Men enn hava vit ikki merkt nakran áhuga fyri partabrøvunum.

Dómurin í Haag

Tá ið dómurin um eksklusiv-sáttmálar varð sagdur í Haag vóru fleiri bangin fyri, at vit fóru at fáa óskipaði viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum, men hetta hendi tíbetur ikki.

Vit kunnu heldur siga, at tað var beint øvugt. Í Havnar Handverkarafelag hava vit í hvussu er upplivað, at næstan hvønn dag eru nýggir limir komnir inn í felagið, og tað er at frøast um.

Rættarmál fyri limir

Í farna ári hevur felagið fört tvey rættarmál í Føroya rætti fyri limir. Fyrra málið var um ógoldna løn, og seinna um burturvísing av limi á arbeiðsplássi.

Sakførari felagsins tók sær væl av báðum rættarmálunum, og fingu vit í báðum førum viðhald í rættinum.

At enda fari eg at minna limirnar á, at tað er umráðandi, at teir altíð lata felagið frætta um tað er eitthvørt, sum mett verður, at felagið eigur at taka sær av.

Audi
SEAT
PORSCHE
Bilasølan
við Óssur Johannesen
Vegurin Longi - 188 Hoyvík - tlf. 31 53 54 - www.audi-vw.net

ALKA forsikring

Få 103 års erfaring i store forsikrings-aftaler

ALKA forsikring blev skabt af de danske fagforeninger i 1903. Siden da har vi leveret store, kollektive forsikringsaftaler til fagforbund og store organisationer, også på Færøerne.

ALKA er anerkendt for sine kvalitetsforsikringer og gode kundeservice. I fire ud af de sidste fem år har Dansk Kunde Index kåret ALKA som forsikringsselskabet med de mest tilfredse og loyale kunder.

Kontakt os på tlf. +45 43 58 57 57 og hør mere om hvad vi kan tilbyde.

ALKA - et anderledes forsikringsselskab

ALKA er ikke sat i verden for at lave store overskud til vores ejere, men for at tilbyde kunderne de bedst mulige forsikringer til de lavest mulige priser.